# Gera ungdómshús í Klaksvík

**Klaksvíkar kommuna fer at seta 230.000 krónur av til ungdómsvirksemi í Klaksvík. Hetta er nýggj játtan, sum skal geva børnum og ungdómi eitt ungdómshús í býnum**

UNGDÓMUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Klaksvíkingar skulu hava ungdómshús aftur, og stendur tað til formannin í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar býráði, so verður hetta hús klárt longu fyrst í komandi ári.

Týskvøldið var býráðsfundur, har millum annað fíggjarætlanin fyri komandi ár var fyri. Á hesi fíggjarætlan er gjørd ein nýggj játtan til ungdómsvirksemi í býnum.

Játtanin er upp á 230.000 krónur, og hon skal brúkast til at fáa ungdóminum høli at halda til í.

– Finna vit pengarnar, so ætla vit at seta fólk at fyrireika hesa ætlan í november og desember, so at húsið kann lata upp fyrst í komandi ári, sigur Jórun Høgnesen, sum er formaður í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar býráði.



*– Vit síggja, at tað eru alsamt fleiri ungfólk, sum ganga og vála á gøtuni, og tað hevur verið meira ófriður av teimum enn vanligt. Tí er tað umráðandi, at vit kunnu bjóða teimum eitt nýtt tilboð, sigur Jórun Høgnesen, formaðurí mentanarnevndini hjá Klaksvíkar býráði*

### Ófriðarligari

Seinasta árið hava tekin verið um, at ungdómurin í Klaksvík er farin at trívast alt verri. Tey mistu dansistaðið fyrr í árinum, og síðani hava tey hildið nógv til á gøtuni.

– Vit síggja, at tað eru alsamt fleiri ungfólk, sum ganga og vála á gøtuni, og tað hevur verið meira ófriður av teimum enn vanligt. Tí er tað umráðandi, at vit kunnu bjóða teimum eitt nýtt tilboð, sigur Jórun Høgnesen.

– Vit brúka stórar milliónaupphæddir til børnini á hvørjum ári, og tí er tað ikki meira enn rímiligt, at vit brúka nakrar hundrað túsund krónur til ungdómin, heldur hon.

### Aftur í gamla ungdómshúsið

Ætlanin er, at nýggja ungdómshúsið í Klaksvík skal verða á júst tí staðnum, sum gamla ungdómshúsið var í sjeyti- og áttatiárunum. Talan er um gomlu húsini á Biskupstøð, har Norðoya Heimavirki eisini heldur til.

Ymiskir leigarar hava verið í ovaru hæddini, men ætlanin er, at nú skal ungdómurin í Klaksvík aftur sleppa at halda til har.

– Vit hava hugt eftir Margarinfabrikkini í Havn, og har er eitt tilboð, sum riggar. Vit ætla at gera líknandi hús, har ung kunnu halda til í rúsfríum umhvørvi, og har tey saman við einum leiðara kunnu skipa fyri ymiskum virksemi, sigur Jórun Høgnesen.

– Vit leggja stóran dent á, at hetta verður gjørt við skili. Vit skulu fyrireika tað væl, so tað riggar frá byrjan, og tað er umráðandi, at tey ungu ikki verða slept upp á fjall og skulu reka húsið einsamøll, sigur hon.




# Byrjaðir at útstykkja



*Nú verða 24 nýggj grundstykki gjørd klár á Helnabrekku*

### Áhugin fyri nýggju grundstykkjunum í Klaksvík er stórur

**Klaksvík:** Komandi vár skulu 24 nýggj grundstykki seljast í Klaksvík.

Klaksvíkar kommuna stendur fyri at gera hesi grundstykki klár á Helnabrekku, og arbeiðið er byrjað. Tað er byggivirkið Højgaard og Schultz, sum stendur fyri at gera tær 24 útstykkingarnar.

– Áhugin fyri hesum grundstykkjunum er sera stórur, og tað er greitt, at øll tey, sum vilja hava grundstykki, fáa ikki í hesum umfarinum, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Tað eru meira enn tvífalt so nógvar umsóknir, sum tað eru grundstykki.

Ætlanin er at grundstykkini skulu standa liðugt fyrst í komandi ári, so fólk kunnu fara at byggja á teimum móti vári



# Atlantis fær hálva millión

**Stuðulin hjá Klaksvíkar kommunu til mentanarhúsið í býnum veksur við fleiri hundrað túsund krónum næsta ár, men hann røkkur bert til rentur og avdráttir**

MENTAN
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Pengaposin til mentanarhúsið Atlantis frá Klaksvíkar kommunu fer at vaksa við fleiri hundrað túsund krónum komandi ár.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2002, sum fekk fyrstu viðgerð í býráðnum týskvøldið, verður skotið upp, at stuðulin til Atlantis verður ein hálv millión krónur komandi ár.

Í hesum árinum fekk Atlantis 190.000 krónur í stuðli, og tí økist kekkurin frá Klaksvíkar kommunu við meira enn 300.000 krónum komandi ár.

### Einki loypir av

Klaksvíkar kommuna er saman við Norðoya Sparikassa og Klaksvíkar Sjónleikarfelag við í ein loysn á fríggjarligu trupulleikunum hjá húsinum, og fyri at húsið ikki skal renna seg fast aftur, hevur Klaksvíkar kommuna gjørt av at økja stuðulin til húsið.

Stuðulin frá Klaksvíkar kommunu dekkar avdráttir og rentur hjá Atlantis, og tí má stýrið fyri Atlantis sjálvt finna pengar til virksemið í húsinum.

Men upphæddin frá Klaksvíkar kommunu ger, at húsið ikki aftur endar í ótolandi støðuni, sum Atlantis var í, tá so at siga einki virksemi var í húsinum.



*Stuðulin frá Klaksvíkar kommunu dekkar avdráttir og rentur hjá Atlantis, og tí má stýrið fyri Atlantis sjálvt finna pengar til virksemið í húsinum*

# Andstøðan finnist harðliga at yvirtøkum

**Minnilutin í uttanlandsnevndini heldur, at yvirtøkur nú verða gjørdar í panikki og at landsstýrið als ikki veit, hvat yvirtøkulógin hevur við sær**

FULLVELDI
*Eyðun Klakstein*

Andstøðan í løgtinginum finnist harðliga at yvirtøkulógini og allari sjálvstýrispoltikkinum hjá landsstýrinum. Í álitnum, sum uttanlandsnevndin hevur gjørt til yvirtøkulógina, hava Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin kontantar viðmerkingar til landsstýrið.

– Her er talan um eitt illa fyrireikað lógaruppskot, sum er gjørt í panikki, og sum landsstýrið ætlar at skunda ígjøgnum. Eingin kennir avleiðingarnar, og ógreitt er, um ætlanin heldur juridiskt, siga Heðin Mortensen og Edmund Joensen, sum umboða Sambandsflokkin í uttanlandsnevndini.

– Vit mæla landsstýrinum til í stundini at sleppa endurskoðaðu loysingarætlanini, sum hevur til endamáls at lirka skaðiligar politiskar avgerðir ígjøgnum uttan fólksin vilja, siga teir.



*Andstøðan finnist hvassliga at yvirtøkulógini hjá landsstýrinum. Uppskotið verður kallað panikkloysn og ódemokratiskt*

### Vita ikki

Eisini umboðið hjá Javnaðarflokkinum. Jóannes Eidesgaard, heldur lítið um uppskotið og politikkin hjá landsstýrinum.

– Tá ymisku landsstýrismenninir verða spurdir, hvørji málsøki eru við í hesari góðu yvirtøkulóg, svarar ein í eyst og annar í vest, tí teir vita snøgt sagt ikki sjálvir, sigur Jóannes Eidesgaard og vísir á fleiri dømi, har landsstýrismenn ikki hava kunna svara fullgott um yvirtøkurnar.

– Vit kunnu als ikki taka undir við, at okkara vælferðarskipan í reinari desperatión hjá einum landsstýri og samgongu verður fyri slíkum bakkøstum. Her er talan um eitt landsstýrið og eina samgongu, sum í tólvta tíma leitar sær eftir onkrum at fara út til eitt løgtingsval við, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tí heldur hann, at tað er meira enn góð orsøk til at mæla løgtinginum frá at samtykkja málið.

### Eingin undirtøka

Bæði umboðini hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum vísa á, at landsstýrið hevur einki megna av teimum málum, sum tað setti sær fyri.

Jóannes Eidesgaard heldur, at Fólkaflokkurin ongantíð hevur viljað meira, og tí er hesin flokkur stóri sigursharrin.

– Samgongan eigur at viðurkenna tann óreingiliga veruleika, at Føroya fólk tekur ikki undir við fullveldisætlanini, og út frá hesum eigur politiska kósin at verða sett, halda Edmund Joensen og Heðin Mortensen.

Teir mæla til, at nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum verður tikið úr skuffuni og brúkt sum grundarlag undir eini nýggjari ríkisskipan.

– Tað, sum landsstýrið ikki megnaði vegna tørvandi dirvi, ger tað nú gjøgnum bakdyrnar, og tað er ímóti allari demokratiskar uppfatan, at landsstýrið ikki letur fólkið siga sína hugsan, heldur Jóannes Eidesgaard.

